# Trýsta danir fyri at fáa øði í grindina

**Paul Watson hevur aftur fingið føroyskt grindadráp ovast á breddan. Sea Shepherd roynir nú at draga Danmark upp í herðferðina móti føroyingum. Føroyska hvalvákníð eitur upplýsing**

INGI RASMUSSEN

So vóru aftur grindaboð úr útlandinum. Og tey eru sjáldan góð hjá føroyingum at hoyra.

Hesaferð fingu føroyingar so aftur eina heilsan frá tí illa lýdda leiðaranum í Sea Shepherd, havsins røktingarmanni, Poul Watson.

Danska blaðið Jyllands-Posten veit at siga, at felagsskapurin fer undir eina herferð móti donskum vørum og fyritøkum í eini roynd at noyða føroyingar at gevast við at drepa grind.

Atgerðirnar eru í fyrstu atløgu vendar móti vørum, sum verða útfluttar til Týsklands, tí týski brúkarin er kendur fyri at vera tilvitaður og politiskur. Men eisini eitt nú Legoland stendur fyri skotum, tí nógvir týskir turistar leita sær hagar.

## Upplýsing skund

Í landsstýrinum stúra tey tó ikki stórvegis fyri Paul Watson.

– Hann blæsir alt upp í ein varg, og so loypa fjølmiðlarnir aftaná, sigur Kate Sanderson, fulltrúi og ráðgevi hjá landsstýrinum í grindaspurningum.

Hon undrast á, at Jyllands-Posten bara hevur brúkt Sea Shepherd sum keldu í sínari grein. Endamálið hjá felagsskapinum er rokkið, júst tí málið verður sligið stórt upp.

Hinvegin heldur hon ikki, at slík tíðindi eiga at undirmetast um okkara leiðir.

– Tá tað er blást upp í fjølmiðlunum, so hava trupulleikarnir longu stungið seg upp, tí fleiri handlar fara at óttast fylgjurnar, sigur Kate Sanderson.

Niðurstøðan hjá Kate Sanderson er, at tað hevur skund hjá umsitingini at fáa gjørt nýtt upplýsandi tilfar at senda handilsketum og øðrum, so skaðarnir kunnu fyribyrgjast.

Sambært greinini í Jyllands-posten hevur týska søluketan ALDI longu bremsað allari sølu av *donskum* fiskavørum fyri einum mánaði síðani eftir fund við Sea Shepherd. Hesum loyvir Kate Sanderson sær at ivast í. Og tað, at lagt verður eftir donskum vørum, sigur nakað í sjálvum sær.

– Hatta er eitt dømi um, at Paul Watson hevur misskilt viðurskiftini millum Føroyar og Danmark, sigur Kate Sanderson, sum ikki óttast, at Danmark fer at taka nakað stig ímóti føroyingum.

## Misti sáttmálan

Tað hava verið nógv átøk móti søluketum síðstu árini. Men tey hava ikki latið við seg koma. Tað er ein bráðvending, um ALDI nú bráddliga letur seg trýsta.

– ALDI er ikki kent fyri at hava ein grønan profil. ALDI fer í øllum førum ikki at lýsa við hesum sum sølutiltaki – tey brúka hetta ikki sum propaganda, sigur Kate Sanderson.

Støðan í Onglandi er í øllum førum púra greið. Har lata søluketurnar kundan gera av, um ein vøra verður seld – ikki umhvørvisverndarfelagsskapir.

Ein sannroynd er tað kortini, at ein laksaútflytari í Klaksvík hevur mist sín sáttmála við ALDI-Süd í Týsklandi fyri tiggjutals milliónir orsakað av einari herferð hjá »Gesellschaft zur Rettung der Delphine«.

Í løtuni kanna tey í landsstýrinum, hvat liggur aftanfyri hetta, og hvat kann gerast.



**Paul Watson, leiðari í Sea Shepherd, hevur aftur sent føroyingum eina óvinarliga heilsan.**

Mynd: Kalmar

– Vit arbeiða alla tíð við hesum spurningum, fylgja við og royna at finna útav, hvat er frægast at gera, sigur Kate Sanderson.

At Paul Watson aftur skal blíva tann ondi andin hjá føroyingum eru tað eftir øllum at døma ikki so nógv sum óttast.

Í løtuni ger hann um seg á vesturstrondini á USA, har hann hevur start seg illan á eina indianarastammu, sum hevur fingið loyvi at veiða fimm bláhvalir.

Men sambært altjóða stjóranum í Sea Shepherd, Lisa Distefano, gevast tey ikki á hondum, fyrr enn føroyingar leggja grindaknívin frá sær.

– Føroyar eru bert ein klettur í Atlantshavinum. Vit skulu hølva tær av. Tað tekur kanska eitt ár ella tvey, men vit fáa okkara vilja, sigur hon við Jyllands-Posten mánadagin.

# So er greitt at skriva undir



**Løgmaður Anfinn Kallsberg er í dag vertur hjá teimum báðum Anthony Lloyd og Niels Helveg Petersen, sum eru komnir hendanvegin at undirskriva marknasáttmálan**

**Løgtingið samtykti í gjár marknasáttmálan, sum landsstýrið hevði lagt fyri tingið, við 28 atkvøðum fyri og ongari ímóti. Føroyski parturin av avtaluni er sostatt greiður til undirskriftirnar, sum verða festar á pappír í kvøld klokkan hálvgum níggju**

LEIF LAADAL

Uppskotið til marknasáttmála við bretar kom uttan hóvaskák gjøgnum í løgtinginum. Allar viðgerðirnar fóru síðuliga fram, og málið varð tikið í tí álvara, sum tað sømir seg einum slíkum máli. Tá ið atkvøtt varð um endaliga uppskotið, sum uttanlandsnevndin einmælt hevði rátt tinginum til at taka undir við, varð úrslitið 28 fyri og eingin ímóti. Sostatt er eingin forðing frá føroyskari síðu, nú danir og bretar skulu í teirra avvarandi ting við sáttmálanum.

Í kvøld klokkan hálvgum níggju fara Anfinn Kallsberg, Anthony Lloyd og Niels Helveg Petersen at skriva undir sáttmálan í nýumvaldu eysturstovuni í Skansapakkhúsinum í Tinganesi.

## Stovan hon er nýggj

Fyri nøkrum mánaðum síðani byrjaði stór umvæling av trimum stovum í Skansapakkhúsinum. Eysturstovan, miðstovan og lítla stovan vestaru megin eru saman við køkinum umvald, soleiðis at rúmini standa snotilig og snøgg, nú marknaavtalan verður undirskrivað. Hølini eru ikki umvæld serstakt til undirskrivingina, men av tí at landsstýrið ikki hevur nøkur beinleiðis móttøkuhølir.

Umvælingin er gjørd á tann hátt, at arkitekturin saman við málarum og snikkarum hevur roynt at fingið hølið at líkjast tí upprunaliga hølinum. Upprunaligu litirnir á veggjunum eru blandaðir av nýggjum, gamla trægólvið er komið undan kavi, og vindeyguni og radiatorarnir eru skift út. Nýggir møblar er keyptir, og nú sáttmálin við bretar verður undirskrivaður, er hetta samstundis fyrsta tiltak í nýggju hølunum í Tinganesi.

Tá ið tær tríggjar undirskriftirnar eru festar á blað, skulu Fólkatingið og Undirhúsið taka støðu til sáttmálan.

Frá danskari síðu er einki, sum forðar fyri, at sáttmálin verður góðkendur. Málið skal fyri í Fólkatinginum áðrenn summarfrítíðina, og danska uttanríkisráðið hevur verið kunnað um samráðingarnar hesi seinastu árini. Harafturat hevur danski forsætisráðharrin Poul Nyrup Rasmussen lovað, at sáttmálin verður skjótt og gott avgreiddur í danska tinginum.

Bretar hava sjálvandi fylgt málinum frá fyrstu røð, og nú endaligi sáttmálin fyriliggur, skuldi einki verið frá bretskari síðu, sum forðar fyri, at hann verður góðkendur í Undirhúsinum. Framferðarhátturin í Undirhúsinum er tann, at sáttmálin verður lagdur fyri húsið og so skal hann liggja har í 30 dagar. Hevur eingin funnist at honum, er hann góðtikin.


**Vit hava fingið nýtt telefonnummar**



[ nýggja telefonnummarið ]

**345600**

ring · trý fýra fimm seks null null

**Avgreiðslan yviri við Strond 23 er stongd.**

Á høvuðsavgreiðsluni á Kongabrúnni húsast:
- Fyrisiting
- Polisudeild
- Sjódeild/sýnsmenn
- Sølu-/marknaðardeild
- EDV deild

Á avgreiðsluni á Hálsi, Smyrilsvegi 20, húsast:
- Skaðadeild
- Sýnsmenn
- Roknskapardeild
- Menningardeild

**Allar deildir hjá Tryggingarfelagnum Føroyar í Tórshavn hava nú sama telefonnummar.**

Telefaxnumrini eru eisini broytt:
- Fyrisiting 345601
- Polisudeild 345602
- Sjódeild/sýnsmenn 345603
- Sølu-/marknaðardeild 345604
- Skaðadeild/sýnsmenn 345605
- Roknskapar-/menningardeild 345606

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

www.trygging.fo • e-mail: tf@trygging.fo